# Fíggjarleiðari

**P/F Demich er størsta HVS fyritøka í Føroyum við umleið 40 starvsfólkum. Virksemið hjá Demich fevnir um alt vanligt HVS-arbeiði, blikksmíð, jarnsmíð og sølu. Demich leggur seg serliga eftir størru HVS-arbeiðum.**

Hjá Demich starvast verkfrøðingar, handverkarar, lærlingar, handilsfólk og kontórfólk. Arbeiðsumhvørvið er gott og tað er ein positivur andi millum starvsfólki. Demich er ein fyritøku í menning við vøkstri á øllum økjum.

Fíggjarleiðarin hjá Demich skal standa á odda fyri fíggjarstýringini hjá felagnum, herundir hava ábyrgd av bókhaldi, ársroknskapi, ávegis roknskapi og fíggjarætlan. Fíggjarleiðarin skal harumframt hava ein týðandi leiklut í menningini av fyritøkuni.

Fíggjarleiðarin skal hava viðkomandi útbúgving. Royndir innan fíggjarstýring er ein fyrimunur. Vit leggja dent á, at fíggjarleiðarin hevur góð samstarvsevni, er sjálvstøðugur og tekur initiativ til at seta tiltøk í verk, ið kunna menna fyritøkuna.

Lønin verður ásett sambært avtalu.

Áhugað kunnu hoyra nærri um starvið við at venda sær til Torbjørn Hansen, stjóra á tlf. 309310.

Umsóknin skal sendast til:
P/F Demich
Stiðjagøta 2
Att: Torbjørn Hansen
Postboks 378
110 Tórshavn.

VIKUBLAÐIÐ




**Tórshavn:**
Stiðjagøta 2 • Tel 309310 • Fax 309311

**Vágur:**
Á Marknoyri • Tel 373535 • Fax 373565